Kunngerðablaðið A
2024
Givið út 13. mai 2024

Nr. 31 10. mai 2024

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kringvarp**
(Árlig prístalsjavning, lægri kringvarpsgjald fyri smærri virki, stovnar o.fl., broyting í kringvarpsgjaldinum fyri likamligar persónar og aðrar smærri broytingar)

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 61 frá 16. mai 2006 um kringvarp, sum broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 26. mai 2010 og løgtingslóg nr. 163 frá 24. desember 2015, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 2, stk. 4, 2. pkt., § 4, stk. 1, § 4, stk. 2, nr. 3, § 4, stk. 3, 1. pkt., tvær staðni í § 4, stk. 6, § 8, stk. 8, 1. pkt., § 10, stk. 5, § 15, stk. 1 og 3, § 16, stk. 2, 4. pkt., tvær staðni í § 16, stk. 3, § 16, stk. 4 og § 19, stk. 5 verður "Landsstýrismaðurin" broytt til: "Landsstýrisfólkið".

**2.** Í § 4, stk. 2, nr. 1, § 5, stk. 2, § 11, stk. 2 og § 15, stk. 2 verður "landsstýrismaðurin" broytt til: "landsstýrisfólkið".

**3.** Í § 4, stk. 7, § 9, stk. 1 og 2 og § 16, stk. 1 verður "landsstýrismanninum" broytt til: "landsstýrisfólkinum".

**4.** § 7, stk. 1 og 2 verða orðað soleiðis:
"Allir likamligir persónar í aldursbólkinum 24 ár og fram til aldurin sambært stk. 2, ið hava fulla skattskyldu sambært § 1 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt, hava skyldu at rinda kr. 170,00 um mánaðin í kringvarpsgjaldi, sbr. stk. 5-6. Skyldan at rinda kringvarpsgjald tekur við tann fyrsta mánaðin eftir, at persónur er fyltur 24 ár. Undantiknir skylduni at rinda kringvarpsgjald sambært 1. pkt. eru persónar, sum vegna útbúgving fyribils hava tilhald uttan fyri Føroyar.
*Stk. 2.* Skyldan at rinda kringvarpsgjald sambært stk. 1 er kr. 70,00 um mánaðin fyri persónar, sum eru í fólkapensjónsaldri sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a. Skyldan at rinda kringvarpsgjald sambært hesum stykki tekur við tann fyrsta mánaðin eftir, at persónur hevur rokkið tann í 1. pkt. nevnda aldur."

**5.** Í § 7, stk. 3, 1. pkt. verður "stk. 4-5" broytt til: "stk. 5 og 6".

**6.** Í § 7, stk. 3, nr. 5 verður "kr. 3.500,00," broytt til: "kr. 3.000,00,".

**7.** Í § 7, stk. 3, nr. 6 verður "kr. 2.000,00" broytt til: "kr. 1.500,00".

**8.** Í § 7 verður aftan á stk. 3 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 4.* Tann 1. januar á hvørjum ári verða gjaldsupphæddirnar sambært stk. 1 og stk. 2 prístalsjavnaðar við tveimum prosentum í mun til ta seinastu gjaldskyldugu upphæddina árið fyri. Árliga gjaldsupphæddin verður rundað til nærmasta heila krónutal."
Stk. 4 og 5 verða eftir hetta stk. 5 og 6.

**9.** Í § 11, stk. 1 verður "Landsstýrismanninum" broytt til: "Landsstýrisfólkinum".

**10.** Í § 23, 1. pkt. verður "landsstýrismannin" broytt til: "landsstýrisfólkið".

**§ 2**

*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

*Stk. 2.* § 1, nr. 4-7 koma í gildi mánaðin eftir, at løgtingslógin kemur í gildi.

*Stk. 3.* § 1, nr. 8 kemur í gildi tann 1. januar 2025.

*Stk. 4.* Øll krøv fyri kringvarpsgjald, ið stava frá tíðini, áðrenn henda løgtingslóg kemur í gildi, eru fevnd av áður galdandi reglum.

Í Tinganesi, 10. mai 2024

**Aksel V. Johannesen (sign.)**
løgmaður

Lm. nr. 65/2023